## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur ella skrið av landnyrðingi og vátaslettings- ella kavaælingur. Hitalagið millum ÷ 1 og + 2 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi, seinnapartin hækkar hann upp í norðan og minkar vindin nakað. Sólglottar, men okkurt kavaælið og hitalagið millum ÷2 og +1 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷3 stig og frostmarkið.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin lot til andøvsgul av norði ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitalagið um ÷3 stig. Leygardagin Strúkur í vindi av útsynningi og vestri og eitt skifti avfall, mest kavi. Hitalagið um frostmarkið.

# Summardáin nýggj høli



*Í teim snotuligu og hugnaligu hølunum er mangt og hvat at fáa*



*24 ára gamla Karina Joensen eigur og rekur Summardáan*

**Leygardagin lat blómuhandilin Summardáin upp í nýggjum hølum á Nólsoyar Páls gøtu. Hetta eru hølini, har kioskin hjá Meinhard fyrr helt til**

HANDIL
*Ragnhild Ellingsgaard*

Klaksvík: Nógv fólk nýttu høvi til at støkka inn á gólvið hendan kalda leygarmorgun. Millum allar blómurnar varð bjóðað heitt kaffi saman við smákøkum, og allar vørurnar vóru niðursettar í samband við, at handilin fyri fyrstu ferð lat upp í hesum hølum.

### Nógv fólk

Ætlanin var, at handilin skuldi lata upp klokkan 09.30, men longu áðrenn klokkan 09.00 stóðu fólk uttanfyri.

Tá vit komu inn á gólvið um afturlatingartíð, var framvegis fult av fólki, so nógv hevur óivað verið at gjørt.

– Her hevur verið fólk alla tíðina, og tað eru vit sjálvandi sera fegin um, sigur Karina Joensen, sum eigur og rekur Summardáan.

– Vit hava verið fleri fólk til arbeiðis allan morgun, og sum tú sært, er handilin næstan tømdur fyri vøru. So hetta er fínasta slag.

### Væl nøgd

Summardáin hevur í fleiri ár hildið til á Gerðagøtu, har tey hava leigað seg inn í eini høli. Hesi høli skulu í dag nýtast til skrivstovuvirksemi.

– Vit fættu um, at kioskin hjá Meinhard skuldi lata aftur, og hildu vit hetta verða ein góðan møguleika til at fáa eini enn betri høli. Vit liggja betri fyri á Nólsoyar Páls gøtu, sum er høvuðsgøtan í Klaksvík, og av tí sama gongur eisini nógv fólk framvið handlinum nú. Hølini sjálv minna um tey gomlu, so vit eru heilt væl nøgd, siga tey úr handlinum.

### Nógv rok

Tað er Karina Joensen, sum eigur og rekur Summardáan. Hon varð útlærd í 1997, og hevur átt handilin í góð tvey ár.

Tann farna vikan er gingin við at fáa alt upp á pláss í teim nýggju hølunum, samstundis sum handilin eisini hevur havt opið í gomlu hølunum.

– Vit hava fyrireikað okkum til flytingina í góðar 3 vikur, men ikki fyrr enn fríggjadagin fóru vit ordiliga í gongd. Tíanbetur hava vit fingið hjálp frá vinum og kenningum, so alt hevur hóast alt gingið upp á stás, sigur Karina at enda.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷28 |
| Nuuk | ÷17 |
| Qaqortoq | ÷15 |
| Ammassalik | ÷6 |
| Saint John's | ÷7 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | ÷4 |
| Seyðisfjørður | ÷2 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 1 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 12 |
| Tromsø | ÷3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 2 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 14 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 9 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 32 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 31 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 967 hPa. vestan fyri Skotland stendur mestsum í stað.




Lágtrýstið við Skotland fer spakuliga suðureftir og køld luft rekur framvegis móti Føroyum av norði og landnyrðingi.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/02 kl. 06[00]– 26/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 0,9°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,3 mm – mált frá 25/02 kl. 06[00]– 26/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 116,6 mm

HESTPRENT Spf.

…hvør sigur at vit eru sum onnur?

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

27. februar: Fullmáni/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. feb | 06.30 | 18.55 | 05.30 | 17.55 | 05.45 | 18.10 | 08.30 | 20.55 | 09.30 | 21.55 | 04.45 | 17.10 | 03.45 | 16.10 | 06.45 | 19.10 | 07.45 | 20.10 | 06.15 | 18.40 | 07.30 | 19.55 |
| 28. feb | 07.21 | 19.46 | 06.21 | 18.46 | 06.36 | 19.01 | 09.21 | 21.46 | 10.21 | 22.46 | 05.36 | 18.01 | 04.36 | 17.01 | 07.36 | 20.01 | 08.36 | 21.01 | 07.06 | 19.31 | 08.21 | 20.46 |
| 1. mar | 08.12 | 20.37 | 07.12 | 19.37 | 07.27 | 19.52 | 10.12 | 22.37 | 11.12 | 23.37 | 06.27 | 18.52 | 05.27 | 17.52 | 08.27 | 20.52 | 09.27 | 21.52 | 07.57 | 20.22 | 09.12 | 21.37 |
| 2. mar | 09.02 | 21.26 | 08.02 | 20.26 | 08.17 | 20.41 | 11.02 | 23.26 | — | 12.02 | 07.17 | 19.41 | 06.17 | 18.41 | 09.17 | 21.41 | 10.17 | 22.41 | 08.47 | 21.11 | 10.02 | 22.26 |

5 707265 100036 >